## Góð Brøndbybyrjan í Royal League

Danska fótbóltsfelagið Brøndby hevur havt eitt alt annað enn gott kappingarár í superliguni í ár. Teir liggja á einum skuffandi 7. plássi heili 19 stig aftanfyri FC Keypmannahavn á 1. plássi. Gongur illa hjá teimum í superliguni, so hava teir fingið eina strúkandi byrjan í Royal League kappingini, sum er ein kapping millum sterkastu liðini í Danmark, Noregi og Svøríki. Fyrsta dystin vunnu teir 3-2 á útivølli móti svenska felagnum Hammarby, og í gjár var so næsti dysturin á skránni, tá teir møttu sama Hammarby á heimavølli. Her spældi Brøndby ein fínan dyst, sum teir vunnu 3-1, og nú tykist danska stórfelagið at vera komið í gongd.

## Neistin-Stjørnan útsettur

Av givum umstøðum er avgerð tikin um, at kvinnudysturin millum Neistan og Stjørnuna verður fluttur. Dysturin skuldi annars spælast leygardagin, men verður hesin ístaðin týskvøldið 5. desember klokkan 20.00

Neistin-VÍF:

# Oddabrak á Hálsi

**Higartil er Neistin einasta liðið, sum hevur bast VÍF. Stóri spurningurin hesa ferð er, hvørt Áki Mørk verður tøkur til dystin hjá teimum bláu**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Vestmenningar vórðu tiknir á bóli, tá Neistin í fyrra dystinum millum liðini vann tryggan sigur í Vestmanna.*

Hóast tað nú eru nærum tvær vikur síðani, at Áki Mørk fekk reytt kort í dysti móti StÍF, so vita teir í Neistanum enn ikki, hvørt talan verður um longt leikbann fyri hansara viðkomandi.

**Broyttur hugburður**

Tá vit hóskvøldið tosaðu við Kára Horn, sum umframt at spæla við besta mansliðnum eisini er samskipari hjá felagnum, segði hann, at teir enn einki vistu um, hvørt Áki var tøkur til dystin leygardagin.

- Men í aðrar mátar eru vit so væl fyri, sum tað nú eina ferð ber til. Helgi Michelsen er framvegis úti, eftir at hann fekk harpiks í eygað, men skaðar gera ikki um seg annars, sigur hann.

Og hann tykist ikki ivast í, at tað skal bera til hjá Neistanum at endurtaka sigurin á VÍF.

- Tað eru vit noyddir til, um vit skulu fylgja við. Vit halda okkum eisini vera sera væl koyrandi, og sjálvt um tú altíð skalt rokna við VÍF, so eru fólk eisini farin at rokna eitt sindur meira við okkum, enn tey hava gjørt. Og tað er nú ikki so galið, sigur hann.

**Mugu skjóta betri**

Sigurin hjá Neistanum í Vestmanna er einasta tapið, sum VÍF hevur verið fyri hetta kappingarárið, og tað er nakað, sum teir gulu vilja hevna. Eisini hóast tað kann verða trupult.

- Tað hevur gingið væl seinastu dystirnar, og tað er ein gongd, sum vit vilja halda fast um. Hinvegin høvdu teir greitt takið á okkum í fyrra dystinum, so eg haldi á ongan hátt, at vit eru favorittar, sigur Ingi Olsen.

Men hvat skulu tit so gera øðrvísi hesaferð?

- Fyrst og fremst skal verjuspælið betrast, og so mugu vit ansa eftir hasum málmanninum hjá teimum. Hann tók nógv seinast, og tá teir tykjast orka betri, so kostar tað sera nógv, um vit ikki skjóta betri enn tað sama, sigur Ingi.

Hann leggur afturat, at VÍF er fullmannað til dystin.

## VB skal halda kósini

**StÍF tekur sunnudagin ímóti VB í Sunset deildini hjá kvinnum. Hjá VB ræður um at halda fast í oddinum, meðan StÍF við einum sigri kann nærkast heiðursmerkjaplássum.**

KVINNU-HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Hjá VB hevur gingið væl síðstu dystirnar. Seinast vunnu tær tepran sigur á Kyndli suðuri í Vági, og undan tí dystinum høvdu tær vunnið stórt á oddaliðnum, Stjørnuni, í høllini í Vági.

Hevur gongdin hjá VB verið góð, so hevur ikki hilnast líka væl hjá strandingum síðstu dystirnar. Tær hava tapt síðstu tveir dystirnar fyri báðum oddaliðunum, Stjørnuni og Neistanum, og tí skulu tær royna at koma í gongd aftur.

Hesi bæði liðini hava møtt hvørjum øðrum einaferð fyrr í ár, tá liðini fyri einum góðum mánað síðani møttust í Vági. Í tí dystinum vann StÍF ein heldur óvæntaðan stórsigur. Úrslitið gjørdist 25-17 til strandingar, og hetta er samstundis einasti sigurin hjá StÍF higartil í ár.

VB fær nú ein møguleika at hevna tapið fyri StÍF á heimavølli, men tær mugu helst leika uttan Gurið Mortensen, sum er farin aftur til Danmarkar. StÍF hevur allar kvinnur tøkar til dystin, og tær ætla sær óivað aftur at leypa ein hvøkk á VB.

# Bæði toppliðini skulu leika

**Bæði Mjølnir og ÍF skulu í dyst í vikuskiftinum í meistaradeildini hjá monnum. Mjølnir tekur ímóti SÍ í KÍ-høllini, meðan ÍF vitjar hjá Fleyr.**

*MANSFLOGBÓLTUR*
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Tveir dystir vera á skránni í meistaradeildini hjá monnum í vikuskiftinum. Tann fyrri verður leygardagin, tá oddaliðið, Mjølnir, tekur ímóti botnliðnum, SÍ.

Gongdin hevur verið sera góð hjá Mjølni síðstu vikurnar. Teir hava vunnið sínar síðstu fýra dystir, og seinastu tvær vikurnar hava teir vunnið á báðum rivalunum í oddastríðnum. Fyrst vunnu teir tryggan 3-0 sigur á ÍF í KÍ-høllini, og so møttu teir eisini Fram í Klaksvík, har teir enn einaferð vunnu tryggan 3-0 sigur.

Hjá SÍ hevur hinvegin ikki gingið so væl. Teir hava bert vunnið ein dyst í ár, men mikukvøldið mundu teir vunnið á ÍF á Kambsdali. Teir taptu tó 3-2, og sostatt gjørdust teir akkurát ov stuttir.

Hesi bæði liðini hava eisini møtt hvørjum øðrum eina ferð fyrr í ár. Tann dystin vann Mjølnir 3-2 í Sørvági eftir ein spennandi dyst. Nú fær SÍ ein nýggjan møguleika at vinna á Mjølni, men undan dystinum má Mjølnir metast at vera favorittur at vinna teirra fimta dyst á rað.

Seinni dysturin verður í Gundadalshøllini sunnudagin, har Fleyr tekur ímóti einum av oddaliðunum, ÍF. Undan dystinum liggur Fleyr á fjórða plássi við 4 stigum. Teir eru helst ikki nøgdir við gongdina hjá liðnum í ár, men Fleyr hevur vunnið sett í hvørjum dysti. Hjá ÍF hevur hinvegin gingið væl. Teir liggja heilt frammi í oddinum saman við Mjølnir, men síðstu dystirnar hevur ikki gingið so væl. Fyrst taptu teir á Mjølni, og síðani vunnu teir við bit og slit á SÍ.

ÍF vann tó fyrsta dystin millum hesi bæði liðini, og enn einaferð mugu teir metast at vera favorittar ímóti Fleyr.